## TILTØK

**Hvítusunnustevnan 2003**
í Ítróttarhøllini á Hálsi í døgunum 6. til 9. juni.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Stórt syngið við kvøld.
Leygarkvøldið kl. 19 Evangel. møti, kl. 22 Youth Arise – ungdómstiltak við ymsari luttøku.
Hvítusunnudag kl. 11 Møti, kl. 18 Evangel. møti. Hvítusunnukvøld kl. 22 Lovsangskonsert við føroyskum solistum og útlendskum tónleikarum – saman við United Voices.
2. Hvítusunnudag kl. 11 Møti og kl. 17 Evangel. møti.
Á møtunum verða nógvir ymsir talarar.
**Barnatiltøk:** Spennandi barnatiltøk verða leygarkvøldið, 1. og 2. hvítusunnukvøld í Rhema. Byrja verður saman í stóru høll. Bøn verður 1 tíma áðrenn kvøldmøtini byrja. Sí annars lýsingar í bløðunum.
Øll eru vælkomin.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Á Hvítusunnu verða møtir í Ítróttarhøllini á Nabb. Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Hví fyrigeva? Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 er Sunnudagsskúli og møti. Richard Schwartson talar.
www.hebron.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*upp á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Peter Tkacyk.
Sunnudagin onki møti og ongin sunnudagsskúli.

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Hósdag kl. 20 verður Taizékvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarrúminum hjá Franciskanasystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. Eingin sunnudagsskúli í morgin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11 Útimøti við Handilskjarnan.
1. Hvítusunnudag møti kl. 11 og 18. Marianne Spor úr Noregi talar.
2. Hvítusunnudag kl. 11 Møti, Palle Petersen talar, kl. 18 Møti, Marianne Spor talar.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Vegna Hvítusunnustevnu í høllini á Hálsi, verða eingi møti í Filadelfia.
www.filadelfia.fo

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Hvítusunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Hera Tróndheim
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti v/ Birgir Johannesen.

**Ebenezer**
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Hvítusunnudag kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.ebenezer.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Summarkonsertir í Havnar kirkju**
Fýra verða konsertirnar í Havnar kirkju í juni mána. Tvær verða hildnar kl. 21 á kvøldi, nú ið kvøldini eru so ljós, og matine-irnar verða altíð hildnar leygardagar kl. 11.30.
Fríggjakvøldið kl. 21 verður forvitnisligt sangkvøld, við tað at tjørnuvíkingar koma til Havnar at syngja Kingo.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
1. hvítusunnudag kl. 19 verður møti við familjuni Nielsen.

**Vestmanna missiónshús**
1. Hvítusunnudag kl. 19.00 verður møti við familjuni Nielsen.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Fríggjakvøldið kl. 20 Hvítusunnustevnan verður sett, Streingjakórið syngur.
Lovsangsløta verður aftaná.

**Tjørnuvík**
Heimamissiónin hevur útimøti í Tjørnuvík leygarkvøldið kl. 20.00.

**Lívsins Orð**
Vegna hvítusunnustevnuna hjá Karisma í Ítróttarhøllini á Hálsi, verður onki møti hjá Lívsins Orð sunnudagin og mánadagin.

**Ungdóms- og Missiónshúið á Glyvrum**
Um høgtíðina verður skipað fyri fylgjandi møtum:
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti v/Kajberg Davidsen, ung syngja.
Leygardagin kl. 10 Bíbiltími v/ Marnu Petersen, evnið, Heilagi andi, kl. 19 Møti v/ Juttu og Sally Lognberg, sangur: Glyvra streingjakór, innsavnan til húsið.
1. Hvítusnnudag kl. 15 Familjumøti v/ Sonju Tausen, kl. 19 Møti v/ Jógvan Højgaard, sangur: Magni Christiansen.
2. Hvítusunnudag kl. 19 Møti v/ Margar Toftegaard, ung syngja. Til øll møtini verður lovsongsbólkur. Bønar- og lovsongsløta verður 1 tíma undan hvørjum møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Frans Jensen, aðalskrivara. Streingjakórið og ungdómskór syngur. Ársgávan til Heimamissiónina verður innsamlað. Aftaná verður drekka. Barnaansing undir møtinum.

**Missiónshúsið, Leirvík**
Hvítusunnu møtir verða í døgunum 7.-9. juni.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Leirvíkskórið syngur.
Hvítusunnudag kl. 19 talar Regin Høgnesen, trúboðari og Kórið Effata, Strendur syngur.
2. Hvítusunnudag kl. 19 talar Niels Jacob Nielsen, trúboðari og Glyvra Streingjakór syngur.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Spælicafé fyri ung.
Sunnudagsskúlin og sunnudagsmøti eru ikki vegna hvítusunnustevnu. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og K í Norðoyggjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbiltími.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Leivur í Buð, kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Hvítusunnustevnan byrjar hvítusunnuaftan kl. 20 við møti.
Hvítusunnudag kl. 18 Møti og 2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti.
Talarar norðanfjørðs og ymiskar sangkreftir luttaka.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadag kl. 21 Bønarmøti. Frá kl. 21 til 23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, kl. 21 Útifundur (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin í Vági**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Hvítusunnudag kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Eingrím Holm talar.
2. Hvítusunnudag kl. 18 Møti við Elisabet Joensen.

**Felagið Tórshavn**
2. hvítusunnudag 9. juni 2003 verður útferð til Gásadals. Havi góð og heit gonguklæðir og matpakka við. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10. Tilmelding.

**Eysturoyar Gongufelag**
Annan Hvítusunnudag 9. juni verður gingið frá Gøtueiði omanfyri Syðrugøtu og norður eftir Fjalli, upp á Kamb og oman av á Breiðaskarði til Fuglafjarðar. Túruin er miðal. Vit møtast á Gøtueiði kl. 14.

## HEILSANIR



Vit hoyra at tú ert í DK til roynd. Alt gott við ynski um, at tú við tínum smílandi hjálpsemi sum lýsir upp í Heilsu verður skjót aftur, vit sakna teg.
**Kundarnir**



**Góða fitta Sunnva**
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 23. mai. Vit gleða okkum sera nógv til tú kemur niður. Vit elska teg.
**Muss William, Brian, Jenny og Daimi**



**Góði gubbi**
Hjartaliga tillukku við degnum 5. juni og tillukku við hattinum. Eisini muss og klemm til Trónd.
**Ynskja vit øll, Bodil og Maria**



**Góða Sólvá**
Hjartaliga tillukku við 5 ára degnum 6. juni. Muss og klemm.
**Ynskja mamma, babba og Hans Haraldur**



**Ein heilsan til Annu, Arnbjørn og Birnu**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum, Anna 8 ár 17. apríl, Arnbjørn 9 ár 3. juni og Birna 8 ár 23. juni.
**Ynskja Erling abbi og Marjun omma**



**Góða elskaða Ada**
Hjartaliga tillukku við degnum 5. juni. Vit elska teg.
**Mamma, babba, Jonhard, Áki og Jógvan**



**Góði Beinir**
Tillukku við 3 ára degnum. Nú ert tú stórur.
**Ynskir beiggi tín Rani**

### Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

#### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:......................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................
..............................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ........................................................................
Bústaður: ...................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«



# Vit missa børnini á gólvið

**Børn, sum eru forsømd, verða víst ov seint til hjálp. Vanrøktin stendur ofta á í somikið nógv ár, at skaðin gerst óbótaligur, sigur leiðslan á Føroya Barnaheimi.**

*Rigmor Dam*

Vit eiga at seta inn sum skjótast, tá vit hava varhugan av, at eitt barn mistrívist heima, tí allar kanningar vísa, at um vanrøktin stendur við til barnið er fýrafimm ára gamalt, er nærum ógjørligt at bøta um skaðan. Hetta var boðskapurin hjá norska serfrøðinginum í vansorgan og harðskapi móti børnum Kari Killén á Føroyavitjanini í síðstu viku.

### Óbúgvin skipan

Leiðslan á Føroya Barnaheimi, Finnur Helmsdal, leiðari, og Halbjørg Lamhauge, deildaleiðari, siga seg vera samd í boðskapinum hjá Kari Killén, um at børn, sum eru fyri vansorgan, eiga at fáa hjálp sum skjótast.

Men samstundis viðgongur leiðslan, at sum skipanin er í løtuni, er hon als ikki búgvin til hetta. Finnur Helmsdal sigur, at børn í Føroyum verða víst alt ov seint til hjálp, og møguleikarnir at hjálpa eru ov fáir.

- Alt barnaforsorgarøkið er ov stirvið, og hugburðurin mótvegis vansorgan má broytast um vit skulu hjálpa børnum fyrr, kanska longu meðan tey liggja í móðurlívi, sigur Finnur Helmsdal.

### Stig verða tikin ov seint

Ein av trupulleikunum er, sigur Halbjørg Lamhauge, at sosialu myndugleikarnar drála ov leingi, at taka neyðugu stigini.

- Ofta gera fólk ikki vart við vanrøkt fyrr enn tað sæðst, og tá er tað ofta vorðið so grelt, at vit orka ikki at síggja tað longur, sigur hon. Og hóast fólk venda sær til Barnaverndina í nóg góðari tíð, skulu ofta fleiri áheitanir til, áðrenn stig verða tikin til at hjálpa barninum. Hetta kemst av, at flestu barnaverndirnar hava ov lítlan førleika, eitt nú tí tær hava ongan fakkunnleika at stiga seg til, umframt at tær hava ov fá tilboð at vísa til.

Tó leggur Finnur Helmsdal dent á, at hetta ikki skal skiljast sum ein ákæra móti fakbólkum sum hava við børnini at gera, so sum heilsusystrum og jarðarmøðrum.

- Hesar gera eitt gott arbeiði, men royndirnar við sosialu myndigleikunum gera, at tær aftra seg við at siga frá, tí tær hava ikki álit á, at neyðug stigini verða tikin.

### Ping-pong ábyrgd

Um vit skulu seta inn fyrr, so krevur tað bæði hugburðsbroytingar og skipanarbroytingar, sigur Finnur Helmsdal, og vísir á, at skipanin er ov stirvin, tá áheitanir koma frá fólki, um at eitt barn mistrívist.

- Eitt nú tá heilsusystrar ella jarðamøður hava illgruna um, at okkurt ikki ruggar rætt. Tá eigur ein automatikkur at vera í skipanini, sum ger, at eygleiðingarnar verða tiknar í størri álvara, og ikki bara verða noteraðar í eina journal, sigur Finnur Helmsdal, sum eisini vísir á, at sum støðan er í løtuni, er eingin, sum tekur ábyrgdina á seg.

- Nú kunnu øll skúgva sær undan ábyrgdini. Um yrkiskunnleikin, tað veri seg sálarfrøðingar ella pedagokar, meta at stig eiga at vera tikin, so er barnaverndin ósamd og øvut. Soleiðis sleppa vit undan at gera nakað sum helst, sigur Finnur Helmsdal, sum kundi hugsað sær meira tvørfakligt samstarv í skipanini.

### Eingin fyribyrging

Ein annar trupulleiki er, at ov fá tilboð eru at vísa til, sigur leiðslan á Barnaheiminum. Eitt nú at fyribyrgja at familjur, sum frammanundan eru í vandabólkum, verða sleptar upp á fjall.

- Hetta kundi verið eitt stað, har mamman longu meðan hon var við barn kundi komið til eygleiðing og vegleiðing hjá kønum fólki, sigur Finnur Helmsdal, sum eisini vísir á, at vit mangla sálarfrøðingar og eina barnapsykiatri.

Tí sum hann sigur, so kemur tað meir enn so fyri, at børn, sum skulu undir psykiatriska viðgerð ella kanningar, verða løgd inn á stongda psykiatriska deild fyri vaksin á Landssjúkrahúsinum, og at hetta er undir alt mark.



*Finnur Helmsdal, leiðari og Halbjørg Lamhauge, deildarleiðari á Barnaheiminum*
*Mynd Jens K Vang*

### Góðar vónir

So samanumtikið er støðan í løtuni ikki góð, sigur leiðslan á Føroya Barnaheimi, sum samstundis vónar, at vitjanin hjá Kari Killén, sum var sera væl móttikin av fólki innan alt barnaøkið, kann birta uppundir eitt orðaskifti, umframt at tey hava góðar vónir til nýggju barnaforsorgarlógina.

Tí sum Finnur Helmsdal tekur til at enda:

- Um vit veruliga vilja gera nakað fyri at geva børnunum og familjunum eitt virðiligt lív, er neyðugt at seta inn langt fyrr.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 06.06. kl. $23^{00}$ Leygardagin 07.06. kl. $23^{00}$
Mánadagin 09.06. kl. $21^{45}$

**P BIO KIOSKIN P**
**Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 06.06. kl. $23^{30}$ Leygardagin 07.06. kl. $23^{30}$
Mánadagin 09.06. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 06.06. kl. $20^{45}$ Leygardagin 07.06. kl. $20^{45}$
Mánadagin 09.06. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 06.06. kl. $20^{15}$ Leygardagin 07.06. kl. $20^{15}$
Mánadagin 09.06. kl. $19^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 13.06.**